


www.oljan.fo

**Jan Müller** 12 - 07 - 2012

# Næmingar í Føroyum leita eftir olju

Í sambandi við áttandu leitiboringina á føroyskum øki í summar og heyst verða oljuleitingartiltøk á miðnámsskúlunum og á Fróðskaparsetrinum. Tiltøkini verða fyriskipaði av Simprentis í samstarvi við FOÍB (Føroya Oljuídnaðarbólkur), og tey eru stuðlað av Statoil. Endamálið við tiltøkunum er at kunna um lestrar- og arbeiðsmøguleikar í oljuvinnuni og at geva luttakarunum eina betri fatan av avbjóðingum og møguleikum í oljuleiting, Fyrsta tiltakið er PetroUniversity, sum verður fyri øllum teimum, sum byrja lestur á Fróðskaparsetrinum í heyst. Tiltakið verður á fabrikkini hjá Öström í Tórshavn 31. august. Annað tiltakið er PetroChallenge, sum verður fyri næmingum á miðnámsskúlum í døgunum 25.-26. oktober. Hetta tiltakið verður á øllum luttakandi miðnámsskúlunum samstundis. Á tiltøkunum verða luttakararnir býttir í bólkar, og hvør bólkur er eitt oljufelag í lærisimuleringini OilSim. Avbjóðingin er at finna rakstrarverdar nøgdir av olju og gassi. Bólkarnir greina magnetiskar, gravimetriskar, seismiskar og umhvørvisligar kanningar og bólkarnir kappast og samstarva um at fáa tillutað bestu leitiloyvini, eyðmerkja leitimið og boristøð, bora leitibrunnar og staðfesta, um møgulig fund eru rakstrarverd. OilSim varð upprunaliga ment í 2002 sum partur av førleikamenningini av føroyskum skúlanæmingum, og hevur síðani verið nýtt um alla verðina at útbúgva næmingar og starvsfólk í oljuvinnuni. Vinnandi bólkurin í PetroChallenge umboðar Føroyar í altjóða PetroChallenge finaluni fyri miðnámsskúlar á Imperial College í London 26. januar 2013. Mynd Stjórin í Simprentis, Ólavur Ellefsen á vitjan hjá FOÍB, Føroya Oljuídnaðarbólki á Bryggjubakka. Statoil stuðlar verkætlanini Í heyst verður bæði borað á landgrunninum og á landi í Føroyum.Her boripallurin Cosl Pioneer, sum borar á landgrunninum.